

## Japanski fíggjarmálaráðharrin lagt frá sær

Shoichi Nakagawa, fíggjarmálaráðharri í Japan, hevur lagt frá sær. Hetta hendir eftir, at hann hevur verið lagdur undir at hava verið fullur til seinasta G7 fundin. Fyrr hevur hann sagt, at hann ikki fór at leggja frá sær fyrr enn ein eykafíggjarlóg varð gjørt. Men nú hevur hann lagt frá sær, eftir at stórt trýst hevur verið á honum, um at leggja frá sær. Taro Aso, forsetisráðharri greiðir frá, at hann virðir avgerðina hjá Shoichi Nakagawa, og hevur fyribils sett Kaoru Yosano, búskaparráðharra, at taka sær av fíggjarviðurskiftunum hjá landinum. Shoichi Nakagawa noktar blankt, at hann var fullur, men harmast, at hann hevur verið orsøkin til so nógva órógv.

# á Atlantsmótinum

oljumyndugleikar hava handfarið hetta sera professionelt. Ein stór stjørna frá okkum.

-Onkur heldur, at myndugleikarnir hava verið ov restriktivir eitt nú við at krevja, at alt virksemi skal um føroyskan keikant.

-Tað eru vit heldur ikki so fegnir um, tí tað økir um útreiðslurnar í einum øki, har útreiðslurnar longu eru stórar.

-Men ger keikanturin ikki, at man verður betri førur fyri at menna føroyskan førleika?

-Haldi ikki man við at lasta og lossa fær so nógvan førleika. Tá leiting fer fram so er tað ikki so lætt at byggja upp ein førleika á staðnum, men tá tú kemur til útbygging, so er hetta øðrvísi. Tá tosar tú um langtíðar ætlanir.

Hjá Dong fylgja tey eisini spent við tí sjeynda brunninum, sum verður boraður í summar. Jan Terje Edvardsen sigur, at økið, har hesin brunnurin verður boraður, er ikki so lítið áhugavert. Teir hava sjálvir kortlagt alt økið og kenna tí væl til hetta prospektið.

-Og er møguleiki hjá ENI at fáa bingo her?

-Tú borar ikki nakað, um tú ikki heldur tað eigur møguleikan at geva bingo.

### Rosebank kann skunda undir boring

-Tit eru eisini við í Rosebank og Cambo. Hvussu stórur er møguleikin fyri at bora føroysku megin markið, nærhendis Rosebankfundinum.

-Tað er rætt, at vit eru saman við somu feløgum báðumegin markið. Úrslitið av metingarbrunninum, sum nú verður boraður á Rosebank, fer eisini at hava týdning fyri avgerðina um at bora føroysku megin markið.

Er úrslitið av Rosebankboringini gott tosa vit kanska um ein brunn í føroyskum øki í 2010 ella 11. Tað fer so at hava við sær, at alt økið fer at verða uppgraderað.

Dong er so eisini við í loyvum føroysku megin markið, har Statoil er fyristøðufelag. Hetta eru øki, á oljumáli verða skrásett sum "High risk high reward."

### Eiga at hava tol

-Hvat vil tú siga til teir føroyingar, sum halda, at vit hava bíðað ov leingi eftir oljuni?

-Hetta er ein vinna, sum hyggur longur fram. Tað vórðu boraðir nógvir brunnar í Noregi, áðrenn nakað varð funnið. Somuleiðis vestan fyri Hetland. Leitivirksemi- í Føroyum er ikki høgt, so við einans einum ella tveimum brunnum um árið fer tað taka nakað av tíð.

-Tit arbeiða eisisni saman við føroysku oljufeløgunum.

-Tey arbeiða sera professionelt við dugnaligum fólkum, sum vit arbeiða saman við.

-Úrslitið av 3. útbjóðing var ikki so gott. Hvønn týdning hevur tað?

-Ikki so stóran. Vit eiga at hyggja eftir øllum økinum eisini tí vestan fyri Hetland sum eina heild. Vit royna at vera við alla staðni, og her eru eisini fleiri onnur áhugaverd feløg, sum arbeiða miðvíst í økinum. Og fleiri av feløgum er sterk oljufeløg.




*Vit síggja loyvini, sum Dong eigur lut í millum Føroyar og Hetland. Miðskeiðis millum Hetland og føroyska markið fer felagið at bora ein gassbrunn í summar. Sirkulin miðskeiðis á kortinum vísir økið, har Dong fer at bora í summar. ,Hetta liggur rættiliga tætt upp at Laggan gassfeltinum*



*Øll manningin hjá DONG vitjaði í Føroyum nøkur ár herfyri.*